krabbameinsfelagið

Fylgiskjal 49

**Almannamálaráðið**

**Eirargarður 2**

**100 Tórshavn**

Tórshavn 17. januar 2020

Tann 7. januar var Krabbameinsfelagið á fundi við Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinnu í almannamálum, har Krabbameinsfelagið kunnaði um virksemið hjá felagnum, umframt at vísa á ábøtur, sum felagið heldur eru neyðugar á almannaøkinum.

Tíbetur eru fleiri og fleiri, sum verða frísk av krabbameini, ella sum liva leingi við sjúkuni. Tað kann taka drúgva tíð at basa sjúkuni, og tað vísir seg, at galdandi lóggáva loftar ikki tí nóg væl. Undir teimum umstøðunum er fíggjarliga hjálpin til tey nærmastu heldur ikki nøktandi.

Tað er sárt, um tann sjúki og familjan, aftur at sjúkuni, eisini fáa álvarsliga fíggjarligar trupulleikar at dragast við.

Landsstýriskvinnan greiddi frá, at tey eru í gongd við at gera uppskot til Vælferðarlóg. Uppskotið hevur til endamáls at laga vælferðarskipanina til føroysk viðurskifti. Eins og forsorgarlógin hevur verið, verður Vælferðarlógin niðasta fíggjarliga trygdarnetið fyri teir borgarar, ið ikki sjálvir megna at uppihalda sær sjálvum og sínum.

Krabbameinsfelagið takkar fyri ein góðan og jaligan fund og fegnast um tær ábøtur, sum eru í uppskotinum um vælferðarlóg. Vit vóna, at evnini niðanfyristandandi eisini kunnu takast við og verða at síggja í endaliga uppskotinum. Ynski okkara er, at Vælferðarlógin verður so góð, at hon fer at tryggja, at tað fer at bera til hjá fleiri at varðveita sítt arbeiði, umframt at tað eisini slepst undan fíggjarligum smeiti, hóast drúgv sjúka rakar.

**Evni, ið Krabbameinsfelagið tók upp á fundinum**

Í dag kann hjúnafelagin í ávísum førum fáa fíggjarligan stuðul. Talan skal vera um álvarsliga sjúku, har vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá persóninum, og av lækna mett alneyðugt, at hjúnafelagin er um tann sjúka.

Í nýggju vælferðarlógini stendur, tá ið persónur undir fólkapensjónsaldur, sum vil sleppa at doyggja heima, verður ansaður av persóni, sum viðkomandi hevur eitt serligt og tætt tilknýti til, kunnu tey fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.

Møguliga kundi hetta økið verið regulerað meira umfatandi, soleiðis, at talan ikki bert er um fólk, ið vilja doyggja heima, men eisini fólk við álvarsligum lívshættisligum sjúkum, ið ikki kunnu vera einsamøll við hús og ikki fáa nakað tilboð um umlætting ella stovnspláss. Tað hevði lætt um hjá nógvum um hjúnafelagi, vaksin børn ella onnur avvarðandi við serligum og tøttum tilknýti til tann sjúka, kundu fingið endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tá ið tað er alneyðugt ,at onkur er um tann, ið er sjúkur.

**Ein trupulleiki, tá ið tað kemur til at passa avvarðandi tvørtur um landamørk**

Í DK kunnu avvarðandi søkja um "Plejeorlov" - fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ella "Plejevederlag" til at passa doyggjandi heima.

The Faroese Cancer Society

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Tel. +298 31 79 59
www.krabbamein.fo

Eisini ber til at søkja um "pasningsorlov", tá ið talan er um álvarsliga sjúk fólk.

Danska lóggávan sigur, at ert tú danskur statsborgari og búgvandi í Danmark, so ber til at hjá teimum avvarðandi at søkja um "plejeorlov" til tann sjúka, men at tað ikki er galdandi fyri føroyingar, ið koma til Danmarkar at passa sjúk.

Tað ber ikki til at rinda plejevederlag til ein persón, búsitandi í Danmark, sum røktar ein persón búsitandi í útlondum og øvut, um avvarðandi úr Føroyum koma til Danmarkar at røkta sjúk. Undantøk eru fyri ES og EØS-lond. Tíverri eru Føroyar ikki fevndar av hesi avtalu (Social sikring i udlandet). Í lóggávuni stendur m.a:

***Plejeren bor i udlandet, og den døende bor i Danmark***

*Det kan være muligt at få økonomisk støtte i form af plejevederlag til pasning af en døende, hvis den døende bor i Danmark, og plejeren bor i udlandet. Det er nødvendigt, at plejeren kan opholde sig lovligt i Danmark.*

*Plejeren kan få plejevederlag, hvis han eller hun er omfattet af reglerne om social sikring i Danmark.*

Í Føroyum áttu vit at arbeitt fyri at komið við í hesa avtalu.

**Dømi:** Vit hava havt samband við eina mammu, ið fór til Danmarkar at passa sjúka dóttur. Hon fekk at vita, at Føroyar vóru ikki fevndar av *lógini um socal sikring.* Hetta gjørdist stórur fíggjarligur smeitur hjá mammuni, tí hon hevði heldur ikki rætt til stuðul úr Føroyum. Mamman kundi ikki sjúkrameldast og hevði brúkt alla sína feriu til at vera um dóttrina. Einasta loysnin var at fara í ólønt farloyvi og hevði sostatt onga inntøku yvirhøvur.

## Fylgjarar

Nógvir Føroyskir krabbameinssjúklingar mugu burtur í lond at fáa viðgerð fyri sjúkuna. Talan kann bæði vera um stuttar og langar steðgir, og viðgerðirnar eru ymiskar. Talan kann vera um skurðviðgerð, kemoterapi ella stráluviðgerð.

Í flestu førum er neyðugt, at fylgjari fer við tí sjúka, og ikki er altíð so lætt hjá fylgjaranum at varðveita inntøkuna, meðan viðkomandi er burtur ella at fáa endurgjald fyri inntøkumiss.

**Dømi:** Ein mamma greiddi okkum frá, at hon hevur vaksna dóttir, ið er sjúk av krabbameini. Mamman fekk onga sjúkramelding fyri at fara við til DK at vera um dóttrina. Læknin vildi ikki sjúkramelda, tí tað var ikki hon, sum var sjúk. Dóttirin hevði tørv á, at mamman kom við orsakað av krabbameinssjúkuni, umframt at hon hevði eina aðra grundsjúku, sum gjørdi, at hon hevði eyka tørv á hjálp.

Dóttirin er gift, men maður hennara var sálarliga illa fyri og kundi ikki fara við sum fyrlgjari.

Tí hevði dóttirin tørv á, at mamman var við.

Mamman fekk ikki frí frá starvi sínum og fekk noktað farloyvi. Hon varð at enda noydd at siga upp. Hon hevur verið um dóttrina í eitt hálvt ár uttan nakra inntøku yvirhøvur. Hetta er stór byrða fyri hana og familjuna. Av tí sama er mamman vorðin sperd, umframt at tað hevur gingið út yvir sálarligu



Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Tel. +298 31 79 59
www.krabbamein.fo

heilsuna. Hon hevur roynt at fara til arbeiðis onkrar dagar fyri at fáa endarnar at røkka. Hetta hevur verið sera trupult, bæði tí at orkan í løtuni er sera lítil, og tí at dóttirin enn hevur brúk fyri henni.

Lógin átti at verið broytt soleiðis, at lækni hevur møguleika at sjúkramelda avvarðandi, so at tey kunnu fara av landinum við tí sjúka. T.d. at fara við sum fylgjari hjá foreldrum, systkjum ella øðrum avvarðandi. Sum nú er, hevur læknin ikki loyvi at sjúkramelda avvarðandi, hóast onkur lækni ger tað.

Tað hevði gjørt tað léttari hjá læknanum og hevði verið stór hjálp hjá teimum avvarðandi og fyri tann sjúka. Um tey ikki beinleiðis eru sjúk, so eru tey rakt og merkt av støðuni, ið ofta ger, at tey ikki megna at arbeiða, umframt at tey eru noydd at vera um tann sjúka.

**Tillagað starv og fyritíðarpensión**

Tað kann taka drúgva tíð at basa sjúkuni, og summi liva leingi við sjúkuni uttan at gerast frísk. Tí hevði tað hevði bøtt um, um sjúkudagpeningur kundi verið veittur í longri tíð, enn lógin heimilar í dag.

Fyri lívsgóðskuna hevur tað eisini nógv at siga at kunnu arbeiða, alt eftir hvør orkan er. Í dag ber til at fáa tillagað starv, men so skal arbeiðsførleikin vera varandi skerdur.Um tað hevði verið broytt soleiðis, at til ber at fáa tillagað starv í avmarkað tíðarskeið, so kunnu tey, sum hava brúk fyri longri tíð at koma fyri seg aftur eftir sjúku, varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin og eisini varðveita fíggjarliga lívsgrundarlagið.

Eisini hevði verið gott, um tað bar til hjá tí sjúka, ið ikki megnar at arbeiða, meðan viðgerð fer fram, at fingið fyritíðarpensión eitt avmarkað tíðarskeið. Hetta hevði givið teimum møguleika at taka farloyvi uttan løn og soleiðis varðveitt tilknýti til arbeiðsmarknaðin.

Undir verandi lóggávu ber tað ikki til, tí ein av treytunum fyri at fáa játtað tillagað starv ella fyritíðarpensjón er, at tú ert varandi sjúkur.

**Dømi:** Ein maður, ið vit hava havt samband við, hevur verið sjúkur í longri tíð. Hann hevur fingið at vita, at hann fer at gerast fráskur, men skal hava viðgerð í tvey ár afturat. Sum støðan er nú, megnar hann als ikki at arbeiða, tí viðgerðin tekur hart upp á hann. Hann orkar heldur ikki at arbeiða niðursetta tíð. Hann hevur fingið sjúkradagpening í 40 vikur, ið er tað tíðarskeið, sum ein kann fáa dagpening. Hann fær ikki forsorgarhjálp so leingi, sum hann eigur nakað av peningi á bók. Fyri at fáa forsorgarhjálp, skalt tú onki eiga (hvørki hann ella konan).

Eingin skipan er at lofta honum, og avleiðingin er, at hann missir tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

Hetta ávirkar hann nógv, bæði sálarliga og fíggjarliga.

Fekk hann fyritíðarpensión hesi bæði árini, kundi hann tikið farloyvi frá arbeiðinum og kundi hvílt í, at hann kundi komið til arbeiðis aftur, tá ið viðgerðin var liðug. Hetta hevði verið góð hjálp, har hann slapp frá at hugsað um arbeiði, og um hann yvirhøvur hevði nakað arbeiði um tvey ár. Sum nú er, fer øll hansara orka til at hugsa um arbeiðið og fíggjarligu støðuna, heldur enn at brúka orkuna uppá at gerast frískur. Tað merkir, at hann verður læstur í eini støðu, har hann er í vanda fyri ikki at koma á føtur aftur.

Tí átti ein skipan at verið, har møguleiki var fyri at fáa fyribils fyritíðarpensión ávíst tíðarskeið, til viðkomandi var klárur at fara aftur til arbeiðis.

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Tel. +298 31 79 59
www.krabbamein.fo

Viðgerðartíðin átti eisini at verið eftirhugd. Vit hava upplivað, at tann sjúki er deyður, áðrenn viðgerðin av umsókn um fyritíðarpensjón, forsorg ella endurgjald fyri inntøkumiss er liðug. Somuleiðis átti at verið ásett við lóg, at stuðul verður veittur frá 1. í komandi mánaði, eftir at umsóknin er móttikin. Vit eru vitandi um avvarðandi, sum hava fingið játtað endurgjald fyri inntøkumiss, men sum ikki kundi fáa tað útgoldið, tí tann sjúki doyði, meðan umsóknini varð viðgjørd.

**Endurmenning**

Endurmennandi tilboð frá Almannaverkinum til fólk undir 67 ár fatar ikki um tey, ið eru palliativ, og tey, ið eru varandi sjúk og sum ikki koma út aftur á arbeiðsmarknaðin. Tilboðið fevnir bert um sjúklingar, har vissa er fyri, at tey koma út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hetta halda vit vera stórt spell, tí tey hava stóran tørv á habilitering í støðuni, og tilboðið átti tí eisini at umfatað hesi. Tey hava t.d. tørv á fysioterapi og ergoterapi fyri at økja um lívsgóðskuna, hjálp til árin og seinárin av viðgerð og sjúku, so tey kunnu vera sjálvhjálpin so leingi sum til ber. Hetta er eisini fyri at minka um tørvin á hjálp á øðrum økjum, eitt nú heimahjálp, færri innleggingar o.a..

**Fólk, ið eru undir 67 ár, ið hava tørv á stovnsplássi**

Vit vita um dømi har fólk, ið eru álvarsliga sjúk av krabbameini, eru løgd inn á sjúkrahús í langa tíð, hóast tey eru liðugt viðgjørd. Tey kunnu ikki útskrivast til heimið, tí tey eru ov vánalig til at kunna vera heima, ella at familjan er útlúgvað/sperd av at hava tey heima. Her átti at verið ein møguleiki fyri at fingið tey inn á stovn. Men av tí at tey eru yngri enn 67 ár er ikki møguligt at fáa tey inn á stovn, tí tað er kommunan, ið varðar av ellis- og røktarheimum og umlætting. Hetta vísir seg at vera ein spurningur um, hvør skal gjalda og um, hvussu hetta roknistykkið skal síggja út.

**Støðan hjá børnum, ið eru álvarsliga sjúk av krabbameini** – tá talan er um børn, ið bæði hoyra undir sjúkrahúsverkið og almannaverkið, og barninum tørvar nógva hjálp frá bæði sjúkrahúsi og AV. Tað má gerast smidligari, soleiðis at hesar skipanir arbeiða betur saman, so at sjúklingurin fær røttu hjálpina. Vit eru vitandi um t.d eina familju, sum í meira enn eitt ár hevur søkt um meira hjálp til umlætting, men enn er tann rætta hjálpin ikki sett í verk, orsakað av ósemju millum sjúkrahús og AV. Tey eru ósamd um, hvør eigur hvørja uppgávu. Tað er sera óheppið fyri familjuna.

Vinarliga

**Jansy Gaardlykke,**

Dagligur leiðari

The Faroese Cancer Society

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Tel. +298 31 79 59
www.krabbamein.fo